# Samskiftisreglur á Fróðskaparsetrinum

## Inngangur.

*Á Fróðskaparsetri Føroya arbeiða granskarar, starvsfólk í fyrisitingini, húsavørðar og starvsfólk á rannsóknarstovum og søvnum. Tey hava ymiskan førleika og ymiskar arbeiðsuppgávur við støði í starvslýsingum og regluverki. Ein bólkur fyri seg eru studentarnir. Studentarnir eru á Setrinum fyri at læra og nema sær kunnleika á teimum økjum, sum Setrið bjóðar fram. Tey hava rætt til at fáa tað besta, sum Setrið kann bjóða við støði í tí tilfeingi og teimum lærarum, sum Setrið hevur at ráða yvir. Millum allar starvsbólkar og studentar á Setrinum fer eitt áhaldandi samskifti fram. Hetta samskifti skal í sínum framburði vera professionelt og hava støði í bæði virðing fyri starvinum og fyri tí einstaka sum menniskja. Tá trupulleikar stinga seg upp, eiga teir so vítt gjørligt at loysast á staðnum. Eru trupulleikarnir av slíkum slag, at teir av einihvørji orsøk ikki kunnu loysast á staðnum, skulu teir leggjast fyri leiðslu Setursins, sum síðani tekur sær av málinum.*

### Alment fyri øll.

§ 1. Avgerðarrætturin hjá teimum, sum hava rætt og skyldu til at taka avgerð, skal virðast.

§ 2. Samskiftistónin í talu og skrift bæði úteftir og inneftir skal vera opin, fólkaligur og professionellur.

### Fyri starvsfólk

§ 3. Allir starvsfólkabólkar skulu sýna virðing fyri arbeiðinum hjá hvørjum øðrum og gera sítt til, at deildirnar og Setrið fungera sum ein vælvirkandi heild.

§ 4. Mistrívast starvsfólk á Setrinum, eigur fólkið fyrst at venda sær til deildarleiðaran og royna at fáa loyst málið. Rektarin eigur altíð at verða kunnaður í slíkum málum.

§ 5. Lærarar á somu deild eiga at sýna opinleika og kunna hvønn annan um undirvísing og gransking sína og geva hvørjum øðrum íblástur til nýskapan og endurnýggjan bæði undirvísingarliga og granskingarliga.

§ 6. Um stríð tekur seg upp á Fróðskaparsetrinum millum starvsfólk, skulu starvsfólk í fyrstu atløgu venda sær til deildarleiðaran á staðnum. Rektarin skal kunnast um málið. Um deildarleiðarin saman við megindeildarráðnum ikki er førur fyri at loysa trætuna, ella er partur av trætuni, skal rektarin taka yvir starvsfólkamálið. Um málið ikki verður loyst, ella rektarin sjálvur er partur av málinum, skal setursráðið viðgera trætuna.

**Studentar**

§ 7. Studentar skulu fáa neyðugar upplýsingar um lestur, námsskipan, undirvísing og próvtøkur, farloyvi o.a. frá deildarskrivstovuni.

§ 8. Miðað verður eftir, at undirvísingartilboð eru greidd úr hondum seinast eitt hálvt ár, áðrenn skeiðini byrja.

§ 9. Studentar venda sær til lærararnar og avtala tíð til viðtal.

§ 10. Verður undirvísing avlýst, skulu studentarnir fáa tað at vita skjótast gjørligt.

§ 11. Viðvíkjandi upptøku av útlendskum studentum verður víst til serstakar reglur um tað.

§ 12. Eins og lærarar og starvsfólk skulu virða tann einstaka studentin, skulu studentarnir eisini vísa lærarum og starvsfólkum virðing.

§ 13. Bæði lærari og studentar eiga at vera væl fyrireikaði til undirvísingina, og studentarnir eiga at vera virknir í undirvísingarhøpi.

§ 14. Um stríð av eini hvørji orsøk tekur seg upp millum lærara og studentar, skulu studentar í fyrstu atløgu venda sær til deildarleiðaran á staðnum. Rektarin skal kunnast um málið. Um deildarleiðarin, saman við megindeildarráðnum, ikki er førur at loysa trætuna, ella er partur av trætuni, skal rektarin taka yvir málið. Um málið ikki verður loyst, ella rektarin sjálvur er partur av málinum, skal setursráðið viðgera trætuna.

§ 15. Skeiðini eiga at vera eftirmett til tess at tryggja framhald og menning. Er studentur ónøgdur við undirvísing, lærara ella annað á deildini, kann hann gera deildarleiðara varugan við hetta ella senda klagu til rektaran. Serligar reglur eru um klagu í sambandi við próvtøkur.

§ 16. Til uppgávur, sum krevja leiðbeinara, hevur studenturin rætt til at velja sær leiðbeinara millum føstu lærararnar og adjungeraðar lærarar.

§ 17. Lærari kann nokta fyri at vera leiðbeinari, um evnið fellur uttan fyri førleikaøki hansara, ella um hann hevur ov nógva leiðbeining frammanundan.

§ 18. Finnur studentur sær ikki leiðbeinara sjálvur, ger megindeildarráðið av, hvør verður leiðbeinari hansara/hennara.

§ 19. Studenturin hevur rætt til eitt ávíst tímatal í leiðbeining.

§ 20. At skriva bachelor-, høvuðs- og masterritgerð er ein sjálvstøðug tilgongd, har tað er studenturin, sum skal koma við uppskoti til arbeiðstittul og arbeiðslag, ástøði og tær heimildir, sum ritgerðin skal byggja á. Leiðbeinarin skal hjálpa studentinum, beina studentin á rætta leið og gera studentin varugan við tey krøv, sum setast til ritgerðina. Tó er tað studenturin, sum hevur ábyrgdina av, at ritgerðin verður skrivað innan fyri ta tíð, sum ásett er.

§ 21. Lærari kann ikki vera leiðbeinari hjá studenti, sum hann ella hon eru nær skyld við, giftur við ella kemur saman við.

§ 22. Verður kynsligt samband millum student og leiðbeinara, skal leiðbeinari straks siga seg frá sum leiðbeinara.

§ 23. Ger leiðbeinari seg í orði ella verki inn á student kynsliga, skal studenturin venda sær til deildarleiðaran. Annars verður mannagongdin tann sama sum er nevnd í § 15.

§ 24. Ger studentur seg í orði ella verki inn á leiðbeinara kynsliga, skal leiðbeinarin venda sær til deildarleiðaran. Annars verður mannagongdin tann sama sum er nevnd í § 15.

Samtykt á setursráðsfundi 21. februar 2008

Jóan Pauli Joensen, rektari